

**Oddfríður Marni Rasmussen**
*Formaður í Listafólkasambandi Føroya*

# So leyp Gerhard aftur á listafólkini

*Sandoyartingmaðurin, Gerhard Lognberg, hevur í seinastuni víst Føroya fólki, hvussu einfaldur politikari, hann er. Flestir føroyingar taka ikki undir við sjónarmiðum hansara. Tað er bara tað, at nógvir føroyskir veljarar, ið hvussu so er einir 600, ið hava valt hann, eru eins einfaldir og Gerhard Lognberg*

Tað er ótrúligt, at ongin í Javnaðarflokkinum talar at. Kanska eru tey troytt av at tala at hesum sokallaða politikaranum, ella tora tey ikki at svara honum aftur, tí kanska fer hann at møta upp á fundum. Óansæð, so er hann valdur á løgting fyri Javnaðarflokkin, og tá ið ongin javnaðarmaður ella kona talar at, so er tað tí, at tey samtykkja.

Vit hava eina íløguskipan í Føroyum, sum veitir listafólkum tíð og frið at arbeiða og framleiða sín listaverk. Henda skipan er umleið helmingurin av samlaðu játtanini til Mentanargrunni landsins, og verður hon veitt sum starvslønir til listafólk. Hin helmingurin verður játtaður sum stuðul til mentanalig tiltøk og listaligar verkætlanir av ymiskum slagi. Nevndin í Mentanargrunni landsins metir útfrá teimum umsóknum, sum koma inn, hvør umsøkjari eigur at fáa starvsløn. Eitt listafólk kann fáa starvsløn frá einum mánaði til trý ár. Mánaðarlønin er hin sama sum hjá lærarum.

Tað gleðiliga er hent, at aftur í ár hava listafólk fingið starvslønir. Í ár vóru játtaðar 2,6 milliónir krónur í starvslønum til listafólk. Eg veit ikki hvaðani Gerhard Lognberg hevur fingið talið 3,4 milliónir krónur til starvslønir frá, men hevði Gerhard gjørt sítt arbeiði nóg væl, so visti hann at siga okkum hetta sjálvur. Eg kann siga Gerhardi, at hinar 800.000 krónurnar eru játtaðar til mentanaligar og listaligar verkætlanir og ikki til starvslønir.

Við hesum veit Gerhard nú eitt sindur um Mentanargrunn landsins, og hvussu henda íløgan er skipað.

Gerhard Lognberg heldur, at starvslønirnar til listafólk kundu verið betur brúktar onkra aðrastaðni, til dømis í fiskivinnuni, at flyta avvarðandi til Danmarkar við sínum kæru sjúku ella til trygd á sjónum. Við hesum logikkinum, so kundu tær 27 milliónirnar til ítróttarhøll á Sandi verið settar í fiskivinnuna ella aðrastaðir, har tær høvdu gagnað betur, men sum flest øll vita, so er samfelagið ikki so einfalt bygt upp, at eitt heilt øki skal strikast av fíggjarætlanini, tí at ein politiskur ráksnúningur heldur seg hála nakrar atkvøður afturat til sín, við at siga, at onnur høvdu havt meira brúk fyri júst hesum pengunum. Sjálvandi eiga avvarðandi at sleppa at fylgja sínum sjúku til Danmarkar, fiskivinnan eigur eisini at kunna virka innan fyri góðar karmar, og sjómenninir eiga at hava eitt trygt arbeiðspláss. Orsøkin til, at vit hava politikarar í Føroyum, er fyri at skapa grundarlag fyri slíkum, ikki við at siga, at nú hava listafólkini fingið sín møguleika í samfelagnum og nú er tíð til, at onkur annar fær ein møguleika. Hetta bíbilskt politiska rákið, har høgra hond ikki veit, hvat vinstra ger, tykist at eyðkenna politisku atgerðirnar hjá Gerhardi Lognberg.

Tað er langt úti, at Gerhard Lognberg heldur tað, at ein íløga á 3,4 milliónir krónur til list og mentan hava skyldina í, at fiskivinnan ikki klárar seg. Heldur hann tað, so hevur hann ikki bara ein politiskan trupulleika, men eisini ein mennsikjaligan og vitbornan trupulleika.

Kanska Gerhard Lognberg stúrsar við, tí at eg havi nevnt játtanina til Mentanargrunn landsins fyri eina íløgu. Tað er við vilja. Í øðrum londum hava tey roknað út, hvussu nógv eitt samfelag fær burturúr hvørjari krónu, ið verður játtað til list og mentan. Ein játtað króna til list og mentan gevur 10 krónur aftur til samfelagið. Tað vil siga, at tær 3,4 milliónurnar, sum herfyri vórðu latnar listini, fara at geva samfelagnum 34 milliónir. Hetta er ikki stuðul, ið verður latin teimum, sum onki framleiða, hetta er ein íløga, har fólk skapa listaverk og skipa fyri mentanartiltøkum, ið gera Føroyar til eitt fjølbroytt og ríkari samfelag, har fólk hava annað at gera, enn bara arbeiða og sova.

Sum formaður í Listafólkasambandi Føroya fari eg ikki at lata hetta fara aftur við borðinum, at ein politikari, ið eigur at standa fyri frælsi, javnaði og brøðralagi skal arbeiða fyri at hála livigrundarlagið undan limunum í LISA við teirri grundgeving, at onkur annar kundi brúkt játtanina. Verkamaðurin fær ikki eitt betri lív, um tú tekur starvslønarjáttanina frá listafólkunum, Gerhard Lognberg.



**Rolf Guttesen**

# Árni Dahl blandar fakligheit og politikk

Hevur tað nakra meining at gera eitt heimsatlas, sum ikki fylgir tilmælum frá internationalum stovnum og forløgum um nakrar felags leiðreglur í skriving av landanøvnum og øðrum staðanøvnum? – Hevur tað nakra meining at gera eitt heimsatlas, har øll nøvnini skulu endurgevast eftir føroyskum ljóðreglum?

Árni Dahl, lærari, hevur í miðlunum havt nakrar viðmerkingar til orðaskiftið, sum hevur verið alment um tað komandi atlassið, sum Skúlabókagrunnurin fer at geva út. Eg loyvi mær hervið at svara Árna Dahl (AD).

## Politiserandi fakligheit?

Dahl hevur fingið tað til, at eg vil fremja "hjálandakend sjónarmið", sum hann málber seg. Hann leggur aftrat, at nú *"skulu føroyskir skúlanæmingar tvingast at skoða heimin av Frúu Plássi"* (hví hetta pláss millum dómkirkjuna og universitetið í Keypmannahavn skal nevnast, forstandi eg ikki?). Soleiðis havi eg ongantíð sagt ella hugsað, harra Dahl.

## Árni gerst ekstremur

Men ikki nokk við tí, AD gerst rættiliga ekstremur: *"Og skulu vit nú í **øllum** lærugreinum og á **øllum** flokksstigum taka atlit til ríkisfelagsskapin, tá ið undirvísingarmiðlar verða framleiddir?"* (AD hevur skriva orðini við feitum typum). Eg havi hvørki hugsað, sagt ella skrivað nakað, ið líkist. Eiheldur havi eg hoyrt nakran ella sæð nakran annan skrivað nakað, ið bara kemur í námind. Hetta er óstýriligur heilaspuni hjá AD.

## Sakir blandast saman, og argumentini skinkla

AD skrivar at eg havi "borið meg undan" at týða navnatilfarið, tí *"hann vildi tryggja sær, at atlasið skuldi ríkisrættarligu støðu okkara."* Her kemur alt í bland hjá Árna, tí hvørki Magnus Tausen vegna Skúlabókagrunnin ella eg hava argumenterað soleiðis.

Fyrsta: Skúlabókagrunnurin og eg samráddust um grundarlag fyri týðing av eingilska partinum av atlassinum. Eg legði míni sjónarmið fram (Skjal: Eintýdd og praktisk staðanøvn, í 11 punktum). Skúlabókagrunnurin vildi ikki taka støðu til hetta, men segði at handritið skuldi viðgerast, tá eg hevði latið tað inn. Eingin semja bleiv funnin. Var tað nakar, sum bar seg undan at taka støðu, so var tað Skúlabókagrunnurin.

Næsta: Mær varð vístur ein listi, hvussu kortini skuldi skipast (hevði einki við týðingina at gera). Eg segði alt fyri eitt, at tað ikki kundi vera rætt, at Ísland skuldi hava umleið 16 ferðir so nógv pláss sum Danmark. Hetta hevur Magnus Tausen sagt seg vilja hugsa um og broyta. Eg rokni við, at hann eisini setir hetta í verk.

## Á beinari kós móti kaos

AD endar við at endurgeva nakað, sum hann sigur seg hava hoyrt frá einum vinmanni. Tað, at AD endurgevur hetta, og kallar tað ein skilagóðan spurning, man merkja at AD er púra samdur í hesum. Um hetta er linjan hjá nationalistiskum puristum, so er sanniliga nakað sum skal fáast í rættlag.

Citatið hjá AD ljóðar: *"Hvør er grundin til at geva út føroyskt atlas, um nøvnini ikki skulu endurgevast við støði í føroyskum ljóðreglum, men skulu endurgevast, sum tey verða endurgivin í donskum atlasum?"* Føroyskar ljóðreglur í fronskum, týskum og kinesiskum?

## Tað finnast skilagóð international tilmælir

Tað, sum eg og fleiri onnur hava víst á, er at Collins forlagið (sum Skúlabókagrunnurin brúkar), ST-stovnar, sum gera viðmælir til standardisering av nøvnum, og lærubøkur, mæla til ávísar leiðreglur. Og nettup ikki at skriva hvør í sínum lagi, ella eftir "føroyskum ljóðreglum." Men eingin – heldur ikki eg - hevur ætlað at gjørt tað eftir donskum atlassum, men nettupp eftir altjóða (internationalum) galdandi reglum og tilmælum. - Kanska kundi man steðga, tá fyrsti setningur varð lisin: "Hvør er grundin til at geva út føroyskt atlas?" Tá eg síggi abbabørnini handfara telduna og ganda við google maps og earth, so má eg siga at stórur partur av einum slíkum atlassi longu liggur tøkt í hvørjum húsi, og børnini duga flestøll at brúka hesar hentleikar.

## Lat realismuna vinna fram, gev purismuni upphøggingarstuðul

Regin Eikholm skrivaði nøkur skørp vísdómsorð seinasta fríggjadag í miðlunum: *"Tann hugsandi føroyingurin hevur tikið realismuna til sín og ynskir at liva í nú'inum – og ikki í einum avsondraðum puristiskum dreymalandi."* Nú meini eg so, líka sum Regin, at allir føroyingar duga at hugsa, men summir standa fastir í national-romantiskari hugsan og tankagóðsi.

## Til nakra nyttu?

Men júst yvirskriftin hjá AD avmyndar eina politiserandi og nationalistiska tankagongd í staðin fyri fakligheit. Yvirskrivftin, ið var *"Heimsatlas ella Heimastýrisatlas"* roynir at gera gjøldur burturúr tí politiska realitetinum, at Føroyar tey seinastu 62 árini hava havt heimastýri. Hetta ger hann við at blanda fakligheitina (heimsatlas) saman við statsrættarligu støðu Føroya, soleiðis sum hon veruliga er og hevur verið leingi, men sum AD helst kanska kundi ynskt sær øðruvísi. Júst hetta er dømi um eitt "puristiskt dreymaland" sum ikki kann brúkast til nakað.